

Kinverski uttanríkisráðharrin Wang Yi á veg á fund við Iran. Umboð fyri Frankaríki, Týskland, Stórabretland, USA, Kina og Russland hava í 17 dagar samráðst við Iran um eina avtalu. Mynd: EPA/GEORG HOCHMUTH

# Oljuprísurin kann lækka munandi hesa vikuna

**Jógvan Hugo Gardar**

13.07.2015 - 11:58

Oljan.fo

Samráðingarnar um eina avtalu millum Frankaríki, Týskland, Stórabretland, USA, Kina og Russland og Iran um kjarnorkuspurningin hjá Iran eru í endaspurtinum. Ein fyribilsavtala kann verða almannakunngjørd um heilt stutta tíð, kanska longu í dag ella í morgin.

Ein avtala kemur at merkja at oljuprísurin kemur at lækka.

Í morgun lækkaði prísurin á Norðsjóvaroljuni Brent við 2,22 prosentum til 61,63 dollarar fyri fatið, meðan amerikanska lættoljan WTI lækkaði við 1,43 prosentum til 57,30 dollarar fyri fatið.

Orsøkin til at ein roknar við eini munandi lækking av oljuprísinum, er at ein semja við Iran kemur at merkja at landið aftur sleppur at selja olju frítt á heimsmarknaðinum. Tað ger at nógv olja kemur á marknaðin, og harvið trýstir prísin. Greinarar meta at ein avtala við

Iran kemur at gera at vónirnar hjá strongdum oljufeløgum um ein oljuprís omanfyri 70 dollarar neyvan gerast veruleiki.

Greinarar hjá bankanum Morgan Stanley siga, sambært Reuters tíðindastovuni, at ein semja við Iran ger at oljuprísurin ikki kemur uppá 70 dollarar fyri fatið aftur fyrrenn í fyrsta lagið í seinnu helvt av 2016.

Heldur ikki semjan um skuldina hjá Grikkalandi tykist at fáa oljuprísin at hækka í dag

Samráðingarnar u meina kjarnorkuavtalu við Iran halda fram. Partarnir siga lítið um hvussu tað gongst, ella nær ein semja kann vera klár. Ein avtala kann vera klár í morgin siga onkrar keldur, meðan umboð fyri Iran hava sagt við altjóða tíðindastovur at tað kann ganga enn longri tíð, tí nógv skal uppá pláss áðrenn ein kann skriva undir eina avtalu.